# Vinnarar til Amin funnir

**Fríggjamorgunin varð drigið um, hvør ið fór avstað við teimum 12 atgongumerkjunum til framførsluna hjá Amin Jensen í Fuglafirði í kvøld.**

KAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við vitjanina hjá Amin Jensen í Føroyum um vikuskiftið hevur Sosialurin skipað fyri eini kapping, har lesarar hjá blaðnum hava havt møguleika fyri at ogna sær nøkur atgongumerkir til framførsluna hjá kenda dananum í Fuglafirði í kvøld.

Ein spurnarseðil hevur verið í blaðnum síðstu dagarnar, har spurt verður, hvørja útbúgving Amin Jensen hevur. Tveir svarmøguleikar vóru: vøddamýkjari ella plátusmiður. Rætta svarið er vøddamýkjari, og tað høvdu tey flestu av teimum mongu, ið svaraðu spurnarseðlinum gitt. Fríggjamorgunin var tí drigið millum teir mongu rættu svarseðlarnar:

Tey seks, ið hava vunnið tvey atgongumerkir hvør, eru:
Sólrun H. Poulsen, Lynggøta 5, Tórshavn
Bárður Højgaard, Leitisvegur 45, Saltangará
Marin S. Thomsen, Fuglafjørður
Alith Højgaard, Eyrgøta 7, Strendur
Helgi Nielsen, í Svanga 14, Tórshavn
Eli Egholm, Millum Gilja 2, Hoyvík

# Team85 byggir føroyska sølubásin í Brússel

**European Seafood Exposition verður í Brússel seinni í mánaðinum, og føroyskar fiskivinnufyritøkur verða vælumboðaðar á stóru fiskivinnustevnuni. Stórt øki er sett av til føroyskan sølubás, og tað er Team85, sum byggir básin fyri luttakandi føroysku fyritøkurnar. Team85 leggur nú seinastu hond á verkið, áðrenn farið verður avstað hósdagin í næstu viku**



*Modellmynd av sølubásinum, sum skal standa á fiskivinnustevnuni í Brússel tann 26. apríl.*
*Mynd: Team85*

SØLUSTEVNA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Í oktober mánaði í fjør fekk Team85 til uppgávu at byggja føroyska sølubásin á fiskivunnustevnuni í Brússel. Undanfarin ár hevur tað verið Petur & Petur, sum hevur staðið fyri byggingini. Team85 skuldi sniðgeva básin, samskipa byggingina av básinum og standa fyri marknaðarføringini av básinum í útlendsku miðlunum.

- Hetta er ein hampuliga stór avbjóðing fyri okkara reklamuvirki, har vit skulu standa fyri øllum tí praktiska niðri í Brússel, men vit hava bygt sølubásar uttanlanda síðani 1993, so vit vita hvat tað er, og hvat skal til. Samstundis eru fólk her hjá okkum í fult sving við fyrireikingarnar til sølustevnuna NAFF, sum verður í Havnini tann 3. til 5. mai, sigur Johnny Gaard, stjóri á Team85.

Við einari gólvvídd upp á 256 fermetrar, 300 fermetrar í lýsingarplássi og tveimum 30 fermetra stórum føroyskum fløggum yvir básinum, so er góður møguleiki fyri, at føroysku virkini síggjast aftur á tí 40.000 fermetra stóra stevnuøkinum, har fleiri enn túsund fyritøkur úr fleiri enn 65 londum luttaka.

## Neyðugt at luttaka

- Starvast tú innan fiskivinnuna, so er tað avgjørt aktuelt at luttaka á messuni. Tað er líkamikið um tú ert keypari ella seljari av fiski, ella um tú ert framleiðslustjóri á einum virki. Um tú fert niður á messuna, so sært tú til dømis allar tær nýggjastu maskinurnar, sum verða brúktar til fiskaframleiðslu, sigur Johnny Gaard, stjóri á Team85.

Umboð fyri Menningarstovuna í Føroyum fara á fiskivinnusølustevnuna í Brússel, og landsstýrismaðurin við fiskivunnumálum, Bjørn Kalsø, verður eisini til staðar. Umframt tað fer Eivør Pálsdóttir at syngja fyri útlendsku gestunum við føroyska básin.

- At tey føroysku virkini standa saman um ein snotuligan føroyskan sølubás, ger at virkini og básurin gerast meira sjónlig, sigur Johnny Gaard.

- Nógv tos er í miðlunum um kreppur og broytingar innan okkara fiskivinnu. Men tað eru virki í Føroyum, sum trúgva upp á hesa vinnuna. Hesar fyritøkur fara til Brússel at bjóða seg fram, og fara tær at fáa vitjan av møguligum keyparum úr øllum heimsins londum á føroyska básinum á heimsins størstu fiskivinnusølustevnu 2005, sigur Johnny Gaard.

Føroyska Fiskirannsóknarstovan fer at vísa filmar á fiskivinnustevnuni um royndarveiðuna hjá Magnus Heinason. Framløgur verða eisini um gransking í tí føroyska havumhvørvinum, og Oluf Færø fer at leggja fram um sporføri, sæð frá einum vinnuligum sjónarmiði.

European Seafood Exposition verður í Brússel frá 26. til 28. apríl. Meir fæst at vita á www.euroseafood.com.




*- At tey føroysku virkini standa saman um ein snotuligan føroyskan sølubás, ger at virkini og básurin gerast meira sjónlig, sigur Johnny Gaard, stjóri í Team85, sum stendur til vinstru*

**Føroyskar fyritøkur, sum eru við**

Fram
PRG
Bakkafrost
Faroe Ship
Faroe Seafood
Nevið
Smyril Blue Water
Kósin
Farex
Kovin
Landshandilin
Menningarstovan
Fiskiransóknarstovan